


# Nýggj oljukelda eystan fyri Føroyar undir framleiðslu í ár

**Jan Müller**

19.01.2014 - 22:27

Oljan.fo

*Enn ein oljukelda í føroyska grannalagnum fer undir framleiðslu í næstum. Talan er um Solan oljuleiðina, sum liggur miðskeiðis millum markið og Hetland. Í løtuni verður útbúnaðurin til at fara undir framleiðslufingin uppá pláss. Fyrsta oljan verður veruleiki móti endanum av árinum. Tað er oljufelagið Premier Oil, sum er fyristøðufelag. Premier er eitt av teimum smærri oljufeløgunum, sum er rættiliga virkið vestan fyri Hetland við fleiri loyvum. Vert er eisini at býta merki í, at nettupp Premier Oil stendur til at fara undir fyrstu oljuframleiðsluna í Falklandsoyggjunum á oljuleiðini Sea Lion.*